**30. des. 2015 AK[1]/JM**

# Kunning um verkætlanir játtaðar av Fiskivinnuroyndum 2016

## Alment:

Stevnan fyri fiskivinnuroyndir er at fremja royndir og kanningar – bæði praktiskar, vinnuligar og vísindaligar, ið menna og økja um framleidni í føroyskari fiskivinnu við atliti at lívfrøðiligari, búskaparligari og samfelagsligari burðardyggari gagnnýtslu av havtilfanginum.
Í longda fýra-ára Programminum fyri 2013-2016[2] eru 3 raðfest øki (eins og í trý-árs programminum frammanundan[3]), sum serligur dentur verður lagdur á:

1. **Royndarveiða og virðisøking av fiski**
   Hetta kunnu vera praktiskar royndir ella vísindarligar kanningar
2. **Burðardyggur fiskiskapur**
   Hetta kunnu vera praktiskar royndir ella vísindarligar
3. **Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni**
   Hetta kunnu vera fyrisitingarligar, fíggjarligar, hagfrøðiligar, samfelagsligar ella búskaparligar kanningar ella greiningar, sum leggja afturat okkara vitan um fiskivinnuna, og harvið menna grundarlagið undir vinnuligum og politiskum avgerðum.

## Játtanir fyri 2016:

Fiskimálaráðið hevur gjørt av at játta pening til 10 nýggjar verkætlanir av játtanini til Fiskivinnuroyndir 2016.
Harumframt er framhaldandi játtan latin 4 verkætlanum, sum byrjaðu í 2014/15, sí fylgiskjal 1.

**Tilsamans fáa sostatt 14 verkætlanir játtaðan stuðul í 2016-18. Tilsamans fáa hesar játtaðar 4,952 mió. kr. harav 2,885 mió. kr. eru fyri 2016**; 1,410 mió. kr. fyri 2017 og 0,658 mió. kr. fyri 2018.

11 nýggjar og 4 framhaldandi verkætlanir ella tilsamans 15 verkætlanir søktu upprunaliga um 6,291 mió. kr., harav 3,682 mió. fyri 2016. Samlaða játtanin til Fiskivinnuroyndir er aftur hækkað við 1,3 mió. fyri 2016 til 3,508 mió. móti at verða lækkað við 1,6 mió. í 2015 frá 3,808 mió. niður í 2,208 mió. kr.
Í ár komu einans 11 nýggjar umsóknir (móti 9 nýggjar umsóknir í 2015 (17 í 2014, 27 í 2013 og 32 í 2012). Talið av umsóknum er fallið støðugt seinastu árini. Tann skjótt lækkandi játtanin

---
[1] Í tíðarskeiðinum frá 1. sept. 2013 til 3. sept. 2015 var samskiparin lagdur inn undir Aðalskrivstovuna v/ Rógva Reinert, aðalstjóra. Síðani er samskiparin aftur (eins og fyrr) lagdur inn undir Fiskivinnustovuna v/Andras Kristiansen, deildarstjóra.
[2] Trý-ára programmið 2013-15 er longt við einum ári óbroytt.
[3] Tey 3 raðfestu økini eru tey somu, men einstøk vegleiðandi undirpunkt eru broytt nakað (víst við gulum í viðfesta Programminum fyri 2013-15).

ávirkar óivað hugin til at søkja um stuðul og líkindini at fáa játtað stuðul[4]. Lýst varð, at einans 2,208 mió. kr. vóru tøkar í 2016 (eins og 2015), men síðani hevur løgtingið hækkað játtanina aftur við 1,3 mió. til 3,508 mió. fyri 2016.
Ein partur av játtanini fyri 2016 ella 623.425 kr. er ikki nýttir/býttir út í hesum umfari. Stýrið hevur avsett/afturhildið 500 kkr. av játtanini (14%) til ymiskar royndir, sum ætlanin er at seta í verk í 2016 (virðisøking og góðskubetringar av feskum fiski vm) og 123.425 kr. (3,5%) til ymiskar útreiðslur hjá FVR (framløgudagurin 8/2-16, lýsingar, fundarpening vm).
Hóast fáar umsóknir, hava 14 av 15 fingið tilsøgn um stuðul. Tvs. at fleiri enn 90% av umsóknunum hava fingið játtað stuðul. Hetta er gjørt við at útluta ein part av játtaðu hækkingini til royndir í 2016 (0,7 mió. av 1,3 mió.)
Tað er vert at leggja til merkis, at aftur í ár er fíggjarstyrkurin, sum verkætlanir søkja um frá FVR, væl undir helvtina av samlaða kostnaðinum (23,7%)[5]. Tá talan er um størri eginfígging, er reiði peningurin ikki tann stóri, men heldur er talan um sum oftast “kapitaliseringar” av eginavriki ella mettum virði, sum verður latið til verkætlanina.
Mælt verður til, sum fyrr, at verkætlanirnar leggja seg meira eftir at leggja dent á at gera góða dokumentatión av eginavriki og mettum virðum í verkætlanunum (striltið gongur kortini við hesum). Onkur fígging kemur eisini uttanífrá.

Umsóknirnar hava verið viðgjørdar eftir sama leisti sum undanfarin ár, og eru mannagongdirnar fyri viðgerðini lýstar á heimasíðuni www.fvg.fo.
Seinnu árini hevur dentur verið lagdur á at fáa vinnufyritøkur at luttaka meira í verkætlanum, og er hetta eydnast rímiliga væl. Aftur í ár varð serligur dentur lagdur á at fáa verkætlanir innan ásettu 3 høvuðsøkini. Í ár fingu øll trý raðfestu økini stuðul eins og undanfarin ár.

Í ár hava vinnufyritøkur fingið 76% (!) av útlutaðu upphæddini (móti 58% í 2015, 62 % í 2014, 58% í 2013 og 60% í 2012). Havstovan hevur fingið 10,7%, sum er væl minni enn 28%, sum hon fekk bæði í fjør og fyrrárið (móti 32% í 2013 og 26% í 2012).
Aðrir almennir granskingarstovnar enn Havstovan (HFS/ Deildin fyri Arbeiðs og Almannaheilsu) hava fingið 10,5% (móti 14% í 2015, 9% í 2014, 10% í 2013 og 5% í 2012). Her er talan um eina PhD-Verkætlan 6,0% og eina verkætlan á HFS 4,6%. At ein PhD verkætlan fær stuðul er fyrstu ferð síðan 2013. Tó skal sigast, at eingin PhD-verkætlan søkti um stuðul í 2015. Eingin søkti um stuðul til Vinnugranskara ella PostDoc-verkætlan í ár.

Í grafiska yvirlitinum fyrikoma Granskingarkjarnurnar enn, men hesar vórðu niðurlagdar í september 2010[6]. Hetta uppbýtið av játtaðum stuðli hevur verið nýtt síðani 2004, og er tí hildið á fram við hesum býtinum. Hetta uppbýtið sæst aftur í myndunum eins og í stabbamyndunum á komandi síðunum. Hesaferð, eins og frammanundan, hava vit býtt stuðulin til almennar

[4] Talið av játtaðum umsóknum: 2015(11), 2014(17), 2013(27), 2012(32), 2011(32), 2010(29), 2009(26) og 2008 (33). Líkindi at fáa stuðul, um ein søkir, er kortini øktur seinastu árini (yvir 90% í 2016)!
[5] Í 2015 (19,4%), 2014 (32,2%), í 2013(31,8%), 2012 (fyrra 28,9% og seinna 38,2%), 2011 (40,4%), í 2010 41%, í 2009 34% og í 2008 góð 42%, sum var væl minni enn í 2007, tá søkt var um 2/3 frá FVR!
[6] Tær báðar nýggju Granskingarkjarnurnar: Kjarnan fyri Veiði- og Reiðskapstøkni (við denti á at minka oljunýtsluna (orkusparing))
og Kjarnan fyri Framleiðslutøkni (við denti á framleiðslu og gagnnýtslu av allari hjávøru (biotøkni)) vórðu niðurlagdar í september
2010 í samband við, at Játtanin til Granskingarætlanir á fíggjarlógini fyri 2011 fór at fella burtur.

verkætlanir upp í tvey – stuðul til verkætlanir á Havstovuni og stuðul til verkætlanir á øðrum stovnum enn Havstovuni[7]:




Ofta verður spurt, um hvat Havstovan fær frá Fiskivinnuroyndum (undir Fiskimálaráðnum) og um vinnan ikki fær í minna lagi? Niðanfyri sæst, hvussu játtanarbýtið hevur verið í meðal fyri øll árini 2004-16:




Sum tað sæst hevur vinnan í meðal fingið yvir helvtina 53% øll árini og í 2016 fær vinnan 76% av játtanini.

[7] Stuðul hevur verið latin til Havstovuna (2004-14) og Fróðskaparsetur Føroya/NVD (2007-08 + 11-12 (og 2014)) og fyri 2012-15 eisini HFS. Fiskimálaráðið er eisini við í hesum bólki fyri 2015 (Verkætlanin: Virðisvøkstur í Fiskivinnuni). Í 2016 kemur Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu (PhD) eisini við í yvirlitinum, men IKKI Biofar í Kaldbak (2016: Inntøkufíggjað virksemi)

**FVR: Samlað játtan og meðal játtanarbýtið árini 2004-16**

| Býtið 2015 kr. | Samlað játtað 2004-16 | Einfalt meðal pr. ár | í procent |
|---|---|---|---|
| Vinnufyritøkur | 29.483.079 | 2.267.929 | 53% |
| PhD/V.gr./lesandi | 6.514.259 | 501.097 | 12% |
| Granskingarkjarnurnar | 3.544.750 | 272.673 | 6% |
| Havstovan | 15.611.337 | 1.200.872 | 25% |
| Aðrir alm. stovnar | 2.026.636 | 155.895 | 4% |
| Tilsamans | 57.182.077 | 4.398.621 | 100% |

Sum tað sæst av omanfyristandandi, hevur vinnan fingið í meðal góða helvt – 53% - av stuðlinum øll árini 2004-16. Vinnan hevur tó fingið 76% í 2016, og er hetta tað hægsta nakrantíð. Havstovan hevur fingið í meðal fjórðingin - 25 % - øll árini. Aðrir almennir stovnar enn Havstovan hava fingið í meðal 4%. PhD-lesandi, Vinnugranskarar og lesandi hava fingið í meðal 12% og Granskingarkjarnurnar (ongin játtan síðan 2011) hava í simplum meðal fingið 6 %.

Árligu játtanirnar í tølum og prosentum:




| Býtið í procentum | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Vinnufyritøkur** | 41 | 48 | 44 | 39 | 40 | 63 | 45 | 54 | 60 | 58 | 62 | 58 | 76 |
| **PhD og V.gr.** | 0 | 8 | 16 | 23 | 25 | 12 | 25 | 8 | 9 | 0 | 1 | 0 | 7 |
| **Granskingarkjarnurnar** | 10 | 9 | 13 | 3 | 9 | 22 | 5 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Havstovan** | 49 | 35 | 28 | 30 | 21 | 3 | 25 | 36 | 26 | 32 | 28 | 28 | 12 |
| **Aðrir alm. stovnar** | 0 | 0 | 0 | 5 | 5 | 0 | 0 | 2 | 5 | 10 | 9 | 14 | 5 |
| **Tilsamans** | 100 | 100 | 101 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 101 |

Aðrir almennir stovnar í talvuni merkir aðrir almennir stovnar enn Havstovan (NVD/Setrið/HFS/FISK/ Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu).




| Býtið kr. | 2.004 | 2.005 | 2.006 | 2.007 | 2.008 | 2.009 | 2.010 | 2.011 | 2.012 | 2.013 | 2.014 | 2.015 | 2.016 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vinnufyritøkur | 2.045.005 | 2.424.500 | 2.185.100 | 1.975.000 | 1.975.000 | 3.162.601 | 2.272.000 | 2.721.000 | 2.557.500 | 2.453.998 | 2.300.000 | 1.221.800 | 2.189.575 |
| PhD og V.gr. | | 378.000 | 800.000 | 1.139.000 | 1.242.270 | 580.858 | 1.242.602 | 523.916 | 381.238 | - | 31.375 | - | 195.000 |
| Granskingarkjarnurnar | 481.250 | 450.000 | 641.000 | 150.000 | 460.000 | 1.117.500 | 245.000 | - | - | - | - | - | - |
| Havstovan | 2.453.750 | 1.772.000 | 1.377.000 | 1.479.750 | 1.063.750 | 140.250 | 1.241.250 | 1.658.587 | 1.096.250 | 1.356.250 | 1.021.250 | 601.250 | 350.000 |
| Aðrir alm. stovnar | | | | 258.018 | 258.018 | | | 100.000 | 200.000 | 410.600 | 350.000 | 300.000 | 150.000 |
| Tilsamans | 4.980.005 | 5.024.500 | 5.003.100 | 5.001.768 | 4.999.038 | 5.001.209 | 5.000.852 | 5.003.503 | 4.234.988 | 4.220.848 | 3.702.625 | 2.123.050 | 2.886.591 |

Aðrir almennir stovnar í talvuni merkir aðrir almennir stovnar enn Havstovan (NVD/Setrið/HFS/FISK/ Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu).

Í 2013-16 er eingin vinnugranskaraverkætlan[8] stuðlað. Ein vinnugranskari varð liðugur í 2012[9], men ongin nýggj umsókn hevur verið síðani.

Vinnugranskaraskipanin hjá Fiskivinnuroyndum gevur virkjum møguleika at seta ein vinnugranskara á virkinum í upp til 3 ár og fáa hann fíggjaðan við 50% upp til 300 kkr. um árið. Kravið er, at granskaraevnini[10] skulu hava støði í menningarætlanum hjá fyritøkuni, og at verkætlanin skal vera í samsvari við Programmið fyri Fiskivinnuroyndir.

---

[8] Serlig føroysk skipan sí www.fvg.fo (danska Erhvervs-PhD skipanin hevur higartil ikki verið galdandi fyri Føroyar, men VMR hevur gjørt avtalu við danskar myndugleikar í 2014, at fáa skipanina eisini at virka fyri Føroyar frameftir). Møguleiki er fyri at knýta vinnuverkætlanina saman við einari vanligari PhD-verkætlan (tá vinnuvirkið gongur við til tað). Ymisku PhD-skipanirnar er øki hjá Mentamálaráðnum www.mmr.fo.

[9] PBP - Fra peptoner til Bioaktive Peptider – vinnugranskari (Atlantic Biotechnology). 1/5-09-30/4-12.

[10] (sí http://www.fvg.fo/Default.aspx?ID=9 ) .

Samlaða játtanin frá FVR2016 og komandi árini sær soleiðis út

| Samandráttur (kkr.): | 2016-18 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|
| **10 nýggjar verkætlanir hava fingið játtað (eftir tillaging/flyting/skerjing):** | **4.150** | **2.083** | **1.410** | **658** |
| Men hesar 6 søktu upprunaliga um | 5.100 | 2.491 | 1.677 | 932 |
| **4 framhaldandi verkætlanir hava fingið játtað (ongin broyting):** | **802** | **802** | **0** | **0** |
| Og hesar 5 søktu upprunaliga um (óbroytt) | 802 | 802 | 0 | 0 |
| **Hesar 14 (10+4) verkætlanir fáa tilsamans játtað:** | **4.952** | **2.885** | **1.410** | **658** |
| 1 nýggj verkætlan hevur ikki fingið játtað stuðul: | 389 | 389 | 0 | 0 |
| Allar 14(11+3) verkætlanirnar bóðu upprunaliga fyri 2016-18 um: | 6.291 | 3.682 | 1.677 | 932 |

Viðfest hesum skjali er:

**- Fylgiskjal 1, sum vísir heiti og upphæddir, sum ymisku játtanirnar hava fingið fyri 2016**
**- Programm 2013-2016 (trý-ára programmið framlongt eitt ár óbroytt)**
**- Lýsingin eftir umsóknum 2016**
**- Blaðlýsingin eftir umsóknum 2016**

# Fylgiskjal 1: Verkætlanir játtaðar 22. des. 2015

| Id. | Navn (stytt/langt) | | | Játtað 2016 |
|---|---|---|---|---|
| | **Nýggjar verkætlanir (10):** | | | **2.082.775** |
| 15/00551 | Menning av flótitrollemmum til uppisjóvarflotan. | BF | V | **130.000** |
| 15/00573 | Útbreiðsla, lívfrøði og fiskiskapur av blálongu undir Føroyum | BF | H | **200.000** |
| 15/00574 | Royndarveiða, virking og søla av taskukrabba | RV/VØF | V | **400.000** |
| 15/00576 | Optimering av sergjørdum makreltroli til trolbátar í bólki 4T | RV/VØF | V | **80.000** |
| 15/00580 | Blóð vekk | BSMF | V | **160.000** |
| 15/00571 | Royking av føroyskum úrdráttum (royking) | RV/VØF | V | **500.000** |
| 15/00572 | Roynd av prototypu 2 av livraanleggi | RV/VØF | V | **150.000** |
| 15/00577 | Fatigue Among Faroese Fishermen (PhD) | BSMF (PhD) | PhD, A | **195.000** |
| 15/00575 | Nýggir marknaðir - Norðurafrika og Arabiska Hálvoyggin, útvaldir marknaðir | BSMF | V | **153.000** |
| 15/00579 | Kanning av føroyska taskukrabbanum | RV/VØF | V | **114.775** |
| | **Framhaldandi verkætlanir (4)** | | | **801.800** |
| 14/00721 | Menning av TrawlCameraLive skipanini - herundir tøkni og handilsmøguleikum, umframt royndarkoyring av framleiðslu í fullum máti til marknaðin | BSMF | V | **300.000** |
| 13/00882 | Menning av skeljavinnu og kanningarførleikum í Føroyum | VF | A | **150.000** |
| 13/00883 | TaraÁrin | BSMF | V | **201.800** |
| 13/00897 | HERCENT | BF/BSMF | H | **150.000** |
| | **Verkætlanir tilsamans (10+4):** | | | **2.884.575** |

Til ymiskt (framløgudag, lýsingar vm.) er avsett 123.425, svarandi til 3,5% av játtanini fyri 2016 3,508 kkr. Harafturat eru 500kkr. ikki útlutaðar. Stýrið ætlar at nýta peningin til serligar verkætlanir (virðisvøkstur, betri góðsku á ráfiski vm), sum stýrið ætlar at stuðla/seta í gongd í 2016.

Styttingar:

BF: Burðardyggur fiskiskapur
RV/VF: Royndarveiða og virðisøking av fiski
BSMF: Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni
Vgr: Vinnugranskaraverkætlan
Phd: PhD-verkætlanir.
pD: Post Doc-verkætlan (er her íroknað almennar verkætlanir)
V: Vinnuverkætlanir,
H: Havstovan
A: Almenn verkætlan, sum ikki er Havstovan

**Programm 2013-2016**

**Stutta:**

**Stevna**
Stevnan fyri fiskivinnuroyndir er at fremja royndir og kanningar – bæði praktiskar, vinnuligar og vísindaligar, ið menna og økja um framleidni í føroyskari fiskivinnu við atliti at lívfrøðiligari, búskaparligari og samfelagsligari burðardyggari gagnnýtslu av havtilfanginum.

**Raðfest øki**

**Royndarveiða og virðisøking av fiski**
**Burðardyggur fiskiskapur**
**Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni**

**Longra**:

**Stevna**
Stevnan fyri fiskivinnuroyndir er at fremja royndir og kanningar – bæði praktiskar, vinnuligar og vísindaligar, ið menna og økja um framleidni í føroyskari fiskivinnu við atliti at lívfrøðiligari, búskaparligari og samfelagsligari burðardyggari gagnnýtslu av havtilfanginum.

**Raðfest øki**

**Royndarveiða og virðisøking av fiski**
Hetta kunnu vera praktiskar royndir ella vísindarligar kanningar, t.d.:

- royndarveiða eftir fiskasløgum, sum ikki verða gagnnýtt sum er
- at fáa størri part av tilfeinginum til matna og finna marknaðir
- at menna tøkni og mannagongdir, ið betra um góðskuna á fiskavørum
- at lýsa og loysa praktiskar trupulleikar at fáa alla veiðu til høldar
- at gera lívtøkni[11] til sjálvsagdan part í gagnnýtslu av havtilfanginum
- fáa fram og nýta eginleikarnar, sum havtilfeingið hevur á fólkaheilsuna

**Burðardyggur fiskiskapur**
Hetta kunnu vera praktiskar royndir ella vísindarligar kanningar, t.d.:

- at menna tøkni, ið fer varliga við umhvørvinum og minkar um orkunýtsluna pr. kg ráfisk
- at menna vitanina um fiskalívfrøðina og vistfrøðina
- at menna skipanir fyri máting av fiskiveiðiorku

**Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni**

Hetta kunnu vera fyrisitingarligar, fíggjarligar, hagfrøðiligar, samfelagsligar ella búskaparligar kanningar ella greiningar, sum leggja afturat okkara vitan um fiskivinnuna, og harvið menna grundarlagið undir vinnuligum og politiskum avgerðum, t.d.:

- tilfeingisbúskapur og fyrisiting
- skipan av framtíðar fiskiskapi og flota undir Føroyum (íroknað ávirkan á onnur lið)
- marknaðarføringsátøk[12], ið kunnu stimbra áhugan fyri føroyskum fiski, herundir á nýggjum marknaðum.

[11] Biotøkni, biotechnology
[12] Tó ikki sølumessur

**Fiskivinnuroyndir 2016**

**Lýsing eftir umsóknum**

Fiskivinnuroyndir er játtan hjá Fiskimálaráðnum, sum stuðlar royndir og kanningar – bæði praktiskar, vinnuligar og vísindaligar, ið menna og økja um framleiðni í føroyskari fiskivinnu við atliti at lívfrøðiligari, búskaparligari og samfelagsligari burðardyggari gagnnýtslu av havtilfanginum.

Verkætlanir, sum stuðul kann søkjast til, eru skipaðar í trý høvuðsøki:

- Burðardyggur fiskiskapur
- Royndarveiða og virðisøking av fiski
- Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni

Serligur dentur verður lagdur á, at:

- vinnan tekur lut í verkætlanini
- eginfígging ella onnur fígging er
- samstarv er við samstarvsfelagar í Føroyum (almennar og/ella privatar) og/ella uttanlands.
- at verkætlanin er skipað við einum stýrisbólki at fylgja við gongdini

Fyritøkur, almennir stovnar og einstaklingar kunnu søkja um stuðul úr Fiskivinnuroyndum.

Víst verður á, at møguleiki eisini er hjá vinnuni at søkja um stuðul til setan av vinnugranskara innanfyri omanfyrinevndu økir við fígging upp til 50%[13].

Um tørvur er á at orða hugskot til ítøkiligar verkætlanir ber til at seta seg í samband við samskiparan um hetta.

Umsóknir skulu verða samskiparanum í fiskivinnugransking í hendi í seinasta lagi **týsdagin 1. desember 2015, kl. 12:00**

**Meira fæst at vita:**
Programm, umsóknarbløð, vegleiðingar og annað kunnandi tilfar fæst á heimasíðu okkara www.fvg.fo

Áhugaði eru vælkomin at venda sær til Jákup Mørkøre, samskipara, við møguligum spurningum.

Fyrivarni verður tikið fyri játtan á løgtingsins fíggjarlóg fyri 2016.

Jákup Mørkøre, samskipari
tlf.: 35 30 30
fartel.: 55 32 48
t-post: jakupmo@fisk.fo

Umsóknir skulu sendast til:
Fiskimálaráðið
Samskiparin í fiskivinnugransking
P.O.Box 347
Yviri við Strond 15
FO-110 Tórshavn

[13] max. 300 kkr./ár í 3 ár

# FISKIVINNUROYNDIR **2016**

## Lýsing eftir umsóknum

**Fiskivinnuroyndir er játtan hjá Fiskimálaráðnum til tess at stuðla praktiskum, vinnuligum og vísindaligum royndum og kanningum, ið menna og økja um framleiðnið í føroyskari fiskivinnu við atliti at lívfrøðiliga, búskaparliga og samfelagsliga burðardyggari gagnnýtslu av havtilfeinginum.**

**Verkætlanir, sum stuðul kann søkjast til, eru skipaðar í trý høvuðsøki:**

- Royndarveiða og virðisøking av fiski
- Burðardyggur fiskiskapur
- Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni

Fyritøkur, almennir stovnar og einstaklingar kunnu søkja um stuðul úr Fiskivinnuroyndum.

**Les meira á fvg.fo**
Her finnur tú programmið fyri 2013-16 við fleiri undirpunktum, umsóknarbløð, vegleiðingar og annað kunnandi tilfar.

**Serligur dentur verður lagdur á, at:**

- Vinnan tekur lut í verkætlanini
- Eginfígging ella onnur fígging er
- Samstarv er við samstarvsfelagar í Føroyum (almennar og/ella privatar) og/ella uttanlands.
- At verkætlanin er skipað við einum stýrisbólki at fylgja við gongdini

Fiskivinnuroyndir kunnu útluta tilsamans 2,208 mió. kr í 2016 til nýggjar og verandi verkætlanir.

Víst verður á, at møguleiki eisini er hjá vinnuni at søkja um stuðul til setan av vinnugranskara innanfyri omanfyrinevndu økir við fígging upp til 50%. (max. 300.000 kr. um árið í 3 ár).

Um tørvur er á at orða hugskot til ítøkiligar verkætlanir ber til at seta seg í samband við samskiparan um hetta. Áhugaði eru eisini vælkomin at venda sær til Jákup Mørkøre, samskipara, við møguligum spurningum.

Umsóknir skulu verða samskiparanum í fiskivinnugransking í hendi í seinasta lagi týsdagin 1. desember 2015, kl. 12.00.

**Jákup Mørkøre, samskipari**
tel.: 35 30 30
fartel.: 55 32 48
t-post: jakupmo@fisk.fo

**Umsóknir skulu sendast til:**
Fiskimálaráðið
Samskiparin í fiskivinnugransking
P.O.Box 347
Yviri við Strond 15
FO-110 Tórshavn

*Fyrivarni verður tikið fyri játtan á løgtingsins fíggjarlóg fyri 2016.*

Fiskimálaráðið

FISKIVINNU GRANSKING